gult2 cyan2 magenta2 svart2



# Býráðið góðtikið ætlanina um leiguíbúðir á Berjabrekku



Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn sigur, at í august verður greitt, um verkætlanin við leiguíbúðunum á Berjabrekku gerst veruleiki

**Nú verður boðið inn til »umvenda lisitatión« at geva tilboð upp á leiguíbúðirnar á Berjabrekku. Tá tað er gjørt, verður støða tikin til, um leiguíbúðirnar verða bygdar, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn**

ÍBÚÐARMÁL
*Eirikur Lindenskov*

Tórshavnar býráð góðtók mikukvøldið ætlanina um Berjabrekku 3, sum er ætlanin um at byggja leiguíbúðir.

Jan Christiansen, borgarstjóri sigur, at hetta ber í sær, at nevndin, sum hevur gjørt eitt byggiprogramm, nú skal arbeiða víðari við málinum.

– Enn hava vit ikki bundið okkum til nakað, men næsta stigið verður, at nøkur útvald byggifeløg verða boðin til tað, tey rópa eina »umvenda lisitatión«. Tað merkir, at feløgini fáa at vita fíggjarkarmin og ynskini. Vit seta av 66 milliónir krónur og siga t. d., at vit vilja hava 66 íbúðir fyri hetta. Uppgávan hjá byggifeløgunum verður tá at koma við einum byggiprojektið, sum síðani verður grundarlagið fyri víðari samráðingum við okkurt av byggifeløgunum, sigur borgarstjórin í Havn.

Hesin hátturin við útbjóðingum er vanligur aðrastaðni og hevur ført til góð úrslit, sigur Jan Christiansen.

Tað eru Tórshavnar kommuna, Íbúðargrunnurin og Húsalánsgrunnurin, sum eru saman um verkætlanina við leiguíbúðunum á Berjabrekku.

Væntandi verða tilboðsprojektini klár í august, og verður tá støða tikin til, um býráðið verður við í verkætlanin, sigur Jan Christiansen.






## Jóan Petur á Landsbókasavninum

FRAMSÝNING
*Eirikur Lindenskov*

Framsýningin sum verið hevur í Kvívík í sambandi við, at 100 ár eru liðin síðani Jóan Petur uppi í Trøð doyði, er nú at síggja á Landsbókasavninum. Framsýningin er opin mánadag til fríggjadag frá klokkan 13 – 17 – fram til 3. august. Á framsýningini eru hópin av myndum at síggja, sum Jóan Petur sjálvur hevur tikið í næstsíðstu øld og um aldarmótið 1900 – og aðrar myndir, sum liggja eftir hann. Eisini vóru nýggjari myndir at síggja.



*Jóan Petur uppi í Trøð*

## NØVN Í VIKUNI

### Anna Húsgarð 70 ár



Í gjár fylti Anna Húsgarð í Havn 70 ár. Anna er ættað úr Fuglafirði, dóttir Onnu Katrinu, Trinu, f. Haraldsen úr Elduvík og Jóan Hendrik Olsen frá Gøtugjógv.

Anna er uppvaksin í Fuglafirði. Á ungum árum fór hon til Noregs at arbeiða, og giftist hon Tróndi Húsgarð, úr Gøtu, í Noreg í 1958.

Síðani fyrst í sekstiárunum hava Anna og Tróndur búð í Havn, fyrst úti í Grønlandi og síðani 1963 í Brøttubrekku

Anna hevur verið heimaarbeiðandi til børnini komu undan. Tá fór hon út at arbeiða, fyrst í handli, men tey seinastu nógvu árini hevur hon starvast á Hvíldarheiminum Naina. Hon gavst í starvi har fyrr í vár.

Anna og Tróndur eiga fýra børn: Eyðun, sum er prentari og stjóri á Prentmiðstøðini, Tórfinn, sum er snikkari, Hendrik, ið er maskinverkførðingur og Karin Margretu sum er verkfrøðingur, men sum starvast á Fiskirannsóknarstovuni.

Føðingardagin helt hon í hjá soninum, Hendriki, í Skagen.

gult3 cyan3 magenta3 svart3



# Teir førningin fram eftir bera



*Yngra ættarliðið hevur tikið við, og tað eldra er farið afturum. Brøðurnir Gunnbjørn og Hans Andrias Joensen í Hósvík taka í móti blómunum, meðan faðirin, Magnus, uttast t.h., erring hyggur at.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Nýggjur partur af føroyskari siglingarsøgu varð skrivaður, tá fyrsta føroyska veitingarskipið, Faroe Connector, legði at bryggju í Hósvík fyrrapartin í gjár**

OLJUVINNA
*Edvard Joensen*

**Hósvík:** Fyrsta føroyska veitingarskipið - supplybáturin - Faroe Connector, sum skrásettur er í Hósvík, kom til Føroya í gjár.

Tað var hátíðardámur á bryggjuni í Hósvík, tá hetta stóra, reyða skipið legði at. Tað flaggaði í bygdini, sum tað so mangan ger. Hósvíkingar eru óførir at flagga, tá okkurt er at flagga fyri. Og maður var farin av húsi at síggja hetta nýggja farið, sum kom til bygdar. Tað størsta higartil, ið skásett hevur verið í bygdini.

Langt er lopið frá Silver Spray til Faroe Connector. Ikki kundi eitt sindur av erni noktast, tá foreldrini hálsfevndu synirnar, Hans Andrias og Gunnbjørn, nú teir stóðu á bryggjuni við hesum stóra skipinum.

Tað byrjaði annars har í familjuni við einum lítlum, um enn sjáldsomum, fiskiskipi. Silver Spray er vist einasta skip í føroyska flotanum, sum í álamanakkanum hevur staðið at vera gjørt úr jarni. Tað plagar annars at vera stál.

Og frá hesi byrjan faðirsins eru synirnir nú farnir inn í hesa nýggju tíðina og hava megnað at fáa eitt stórt veitingarskip skrásett í Hósvík.

Jú, tað var stílur yvir. Borgarstjórin, onkur bygdarráðslimur og reiðarin hildu røðu, tá lagt var at, og fólk vórðu boðin umborð at síggja skipið.

## Væl útgjørt skip

Skipið er ikki heilt spildurnýtt kortini. Tað er smíðað í Klaipeda í Litava í fjør og hevur higartil itið Esvagt Connector, og var tað felagið Esvagt í Esbjerg, sum átti skipið.

Skipið er góðar 56 metrar langt og 14,6 metrar breitt. Tað er merkt 1890 bruttotons.

Maskinkraftin er stór. Tvær maskinur, upp á 2.400 KW hvør. Tað gevur eina samlaða maskinorku upp á einar 6.500 hestakreftir. Umframt hevur skipið tvær bógskrúvur og Azimuth skrúvu. So alt í alt hevur Faroe Connector fimm skrúvur.

Útgerðin á brúnni er eisini tann mest nútímans, sum finst. Millum annað er skipið útgjørt til at arbeiða við kavarum, sum aftur ger, at neyðugt er at skipið altíð liggur púra stilt. Og tað verður stýrt við einum tóli á brúnni, sum sigur, hvar skipið liggur, og at har verður tað so liggjandi. Hvussu vindur og streymur annars bera seg at.

Tað er sera umráðandi, sigur skiparin, at hava slíka útgerð, eitt nú tá lossað verður við boriallarnar.

Skipari á Faroe Connector er danin Børge Nielsen, sum hevur verið við skipinum, síðan tað varð smíða.

Hann greiðir frá, at teir eru 12 mans við. Átta føroyingar og fýra danir. Men innan alt ov langa tíð, fara bara føroyingar at vera við skipinum, sigur hann. Tá verður núverandi yvirstýrimaðurin, Hendrik Olsen, sum er føroyingur, eisini skipari.

Hendrik hevur áður siglt við føroyskum farmaskipum, og seinnu tíðina verið skipari á Tórsvík hjá P/F Thor í Hósvík. Men hann hevur ongantíð verið við veitingarskipi, og hann gleðir seg til at sigla við hesum skipinum, sigur hann.

Børge Nielsen, skipari, sigur, at nú fara teir í fyrsta umfari at venja manningina við skipið. Men umleið hálvan juli, verður farið til arbeiðis, tá BP fer at royndarbora undir Føroyum. Tá tann boringin er liðug, verður farið í bretskan sjógv at arbeiða fyri BP, sigur Børge Nielsen, skipari á Faroe Connector.



*Hendrik Olsen verður fyrsti føroyski skiparin á føroyskum veitingarskipi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Álítandi felagi

Annar høvuðsstuðulin undir øllum tiltakinum, Hans Andrias Joensen, í Hósvík, sum saman við bróðrinum Gunnbirni, rekur P/F Thor, sigur, at hesin mátin teir hava valt, tykist tann rætti at koma inn í oljuvinnuna.

Teir hava við felagnum Thor havt vaktarskip liggjandi í Norðsjónum, men ongantíð nakað veitingarskip kortini.

Nú hava teir fingið tann møguleikan við at kasta saman við felagið Esvagt í Esbjerg, sum hevði slík skip frammanundan.

Hans Andrias Joensen sigur, at tað avgjørt er ein trygd at samstarva við eitt felag, sum er so »toppseriøst«, sum hann tekur til.

Esvagt hevur royndirnar, og teir hava skipini. Men Thor hevur tann fyrimun, at felagið er føroyskt. Og føroyskt felag á føroyskum øki, man ivaleyst vera ein avgjørdur fyrimunur.

P/F Thor í Hósvík og Esvagt í Esbjerg hava í felag stovnað felagið Esvagt - Thor við helvtarbýti í partaeningi. Gunnbjørn Joensen er stjóri í Esvagt - Thor. Tað er hetta felagið, sum eigur Faroe Connector, sum skrásettur er í Hósvík.